# UMHUGSA FÓLKAATKVØÐU UM SAMBAND ELLA LOYSING

**RÍKISFELAGSSKAPUR** Á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið varð spurningurin reistur um at havt fólkaatkvøðu í Føroyum um ríkisfelagsskapin fyri at jarða tað stríðsmálið

Áki Bertholdsen

- Hví ikki hava eina fólkaatkvøðu í Føroyum um ríkisfelagsskapin við Danmark?

Tað var ein spurningur, sum Axel Skoubo reisti á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum í Trongisvági leygardagin.

Hetta var eitt uppskot, sum fekk rættiliga góða undirtøku á landsfundinum.

Ikki minst tók floksformaðurin sjálvur Jóannes Eidesgaard, væl ímóti uppskotinum.

- Spurningurin um okkara støðu í ríkisfelagsskapinum er ein spurningur, sum hevur gruggað føroyskan politikk í meiri enn eina hálv øld nú, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at hetta er ein spurningur sum hevur stolið alt ov nógva tíð og orku frá vanligum, praktiskum politikki í Føroyum øll hesi árini.

Og so leingi spurningurin ikki er avgreiddur, fer hesin spurningurin framhaldandi at liggja sum eitt tungt skýggj yvir øllum føroyskum politikki.

Tí heldur hann, at tað hevði verið eitt hugskot at fingið hendan spurningin avgreiddan einaferð fyri allar.

Ella í minsta lagið at fingið jarða hetta stríðsmálið tey næstu nógvu árini, leggur hann afturat.

### Fólkaatkvøða

Jóannes eidesgaard heldur, at ein máti at jarða hendan spurningin fleiri ár fram í tíðina, hevði rætt og slætt verið at havt eina fólkaatkvøðu um ríkisfelagsskapin.

Og hann rør enntá framundir at hava eina slíka fólkaatkvøðu áðrenn valstríðið upp undir næsta løgtingsval byrjar.

- Annars verður ríkisfelagsskapurin enn einaferð tað stóra stríðsmálið í einum valstríðið, sigur hann.

Hann sær fyri sær, at spurningurin, sum veljarin skal taka støðu til á eini fólkaatkvøðu, verður so einfaldur, sum tilber.

- Tá ið úrslitið av eini slíkari fólkaatkvøðu fyriliggur er hesin spurningurin avgreiddur í føroyskum politikki.

- Er meiriluti fyri loysing, taka vit tað til eftirtektar. Er meiriluti hinvegin fyri framhaldandi ríkisfelagsskapi við Danmark, eigur friður at valda um hendan spurningurin, tí so er hann avgreiddur tey næstu nógvu árini, sigur Jóannes Eidesgaard.

> **Hetta er ein spurningur, sum spjaðir meiri enn hann savnar**
>
> JÓANNES EIDESGAARD



**FÓLKAATKVØÐA**

*Spurningurin um loysing ella samband hevur gruggað føroyskan politikk í eina hálva øld og tað blívur hann við at gera. Tí hevði tað verið ein fyrimunir at fingið tað málið avgreitt, sigur formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard*

## Onki ímóti fólkaatkvøðu um fullveldi

- Vit hava havt eina fólkaatkvøðu um okkara ríkisrættarligu støðu á politisku dagsskránni í fleiri ár.

Tað sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, nú javnaðarfólk hava reist spurningin um at fáa hetta stríðsmálið í føroyskum politikki, avgreitt við eina fólkaatkvøðu.

Tí hevur Tjóðveldi onki ímóti at tað verður gjørt.

Kortini er hann ikki heilt vísur í um Javnaðarflokkurin meinar hetta í álvara, tí hann hevur illgruna um, at hetta er mest fyri at fáa fólk at hugsa um annað enn teir veruligu trupulleikarnar hjá flokkinum og samgonguni sum heild, ikki minst sosial og fíggjarpolitikkin.

Men Formaðurin í Tjóðveldi leggur dent á, at ein fólkaatkvøða má vera undir skipaðum viðurskiftum.

- Tað skal ikki bara vera ein fólkaatkvøða, har fólk skulu taka støðu til samband ella loysing, tí tann spurningurin varð faktiskt avgreiddur í 1946.

- Tá fór ein sonn ræðuherferð fram, sum veljarin tíbetur kláraði at síggja tvørtur ígjøgnum og atkvøddu fyri loysingini, men eina slíka fólkaatkvøðu skulu vit ikki hava aftur.

Høgni Hoydal sær fyri sær, at tilgongdin verður soleiðis, at vit fyrst fáa eina fólkaatkvøðu um okkara nýggju stjórnarskipan, sum politisk semja er um, har tað verður staðfest, at alt vald yvir Føroyum liggur í Føroyum.

- Tá ið tað er avgreitt, eiga vit at fara undir samráðingar við danir um eina skipaða og siviliseraða avtalu.

- So vita fólk, hvat tey atkvøða um og tað má vera rætta mannagingdin, sigur Høgni Hoydal.